

*Rasmus Magnussen (48) við 2 ára gomlu tvíburunum Elisabet og Sofía*



honum.

- Ja, eg komi ikki longur í hasar býttur illstøðurnar, har alt fer upp í ein spíss, so eg eri avgjørt vorðin róligari, sigur hann.

## Smakk av himmiríki

Í niðaru hædd er desertborð við litføgrum køkum, smoothies og sjokolátafontenu til at dippa skúmfidusar ella frukt á spjóti í.

Men longu tá 50 ára gamli Ólavur Rasmussen, prestur í farloyvi, kemur upp gjøgnum trappurnar við 4 ára gomlu Unu í aðrari hondini og einum tallerki í hinari, líkist hann einum angrandi manni.

- Hygg her góða. Set teg her og ansa eftir, at tú ikki dálkar teg, formanar hann. Setir tallerkin við smeltaðari sjokolátu og træspjóti við skúmfidusi beint framman fyri henni, og strýkur varliga hondina eftir sarta kjólanum.

– Nei, tað veit Gud, hetta gongur ikki, suffar hann, leypur upp eftir serviettum, sum hann ballar hana inn í. Meðan hann matar henni við skúmfidusinum, sleppur lítla Una, við himmalvendum eygum og myrkabrúnum sjokolátaskeggi eina lítla løtu í himmiríkið.

## Stovna pápafelag

Ólavur eigur eisini 1½ ára gomlu Ingibjørg, sum tíverri er sjúk í dag. Knappliga skjýtur hann upp, at teir stovna ein pápabólk, eitt Føroya Felag fyri gamlar Pápar. Hetta eru teir við uppá, og øll rullan verður boðin suður til Akrabyrgi, har hann eigur eina smáttu ytst úti á tromini til eitt høgt forberg. Men hann uggar páparnar við, at har er hegn fyri, so børnini detta ikki útav. Onkur kemur við einum lítlum pippi um, at konurnar kanska eisini kundu komið við. Men av onkrari løgnari orsøk verður hetta hintið fullkomiliga ignorerað.

Annars heldur Ólavur sum so ikki, at hann er ein øðrvísi pápi nú enn fyrr. Men hann er avgjørt meira tilvitaður um, at hann er vorðin eldri.

- Tankarnir um framtíðina hjá døtrunum gera meg sárbaran. Fyrr var alt ein sjálvfylgja og fór bara at ganga, sigur Ólavur, sum kortini kennir á sær, at hann verður hildin uppi og í gongd av at vera pápi. Tí lata vit eisini prestin eiga síðstu orðini, hendan hugnaliga og lívsjáttandi sunnudagin í faðirfangi.

- Fyrr var lívið endaleyst, men nú er tað avmarkað.

## Komu livandi undan

Borðini eru bumbað. Rukkaðir serviettar, kleprutir íspinnar, skitnir tallerkar, koppar og hálvtóm víngløs við djúsi í liggja eftir teimum 10 pápunum og 13 børnunum, sum nú eru farin út í góðveðrið – onkur helst niðan á plenuna, har B36 og EB-Streymur skulu spæla. Á einum borði liggur eitt ljósareytt húgvusett og í einum vindeyga ein posi við skiftiklæðum. Og við hvønn kuvert liggja spískir gaflar, long træspjót og hvassir Victorinox-knívur, sum einhvør mamma effektivt hevði beint burtur, um hon var við í morgun. Men mammurnar vóru ikki við í morgun, og øll komu livandi undan.



*Ivan Niclasen (47) við 1 ára gomlu Bjørk og Georg, sum er 3 ár*



*Steintór Rasmussen (47) við 5 ára gomlu Rakul*



*Ólavur Rasmussen (50) við 4 ára gomlu Unu*